SPEKT | statsaut. revisorar

ARKIV

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2007

Correspondent Firm of
KPMG International
a Swiss Cooperative

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará · Faroe Islands
Telefon +298 474 474
Telefax +298 474 475

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	2
Ársfrágreiðing	4
Roknskaparátekning leiðslunnar	7
Átekning frá óheftum grannskoðara	8
Nýttar roknskaparreglur	9
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2007	10
Fíggjarstøða 31. desember 2007	11
Notur	13

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon 35 35 80
Telefaks 35 35 81

Roknskaparár nr. 3

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Elisabeth Eldevig, formaður
búskaparfrøðingur

Bjørn á Heygnum, næstformaður
advokatur

Niels Th. Pedersen
maskinmeistari

Marion á Lakjuni
cand.polit.

Anna Rubeksen
bóndi

Varalimir:

Katrina Maria Johannesen
løgfrøðingur

Óluva J. Midjord
yrkislærd búnaðarkvinna

Heðin D. Poulsen
løgfrøðingur

Jónfinn Thomsen
advokatur

Sigert Patursson
bóndi

Stjórn

Sjúrður Knudsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
Correspondent Firm of *KPMG* international

Peningastovnar

P/F Føroya Banki
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Landsbankin
Kauthing Bank hf.

Ársfrágreiðing

Virksemi
Endamál Búnaðargrunnsins er at veita lán til landbúnaðin og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 30. apríl 2007.

Herumframt umsitir grunnurin festikontur og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið
Inntøkurnar í 2007 eru 9.305 tkr. móti 8.139 tkr. árið fyri, og er hetta ein vøkstur upp á 1.166 tkr. Hækkaðu inntøkurnar stava frá einum jøvnum vøkstri í leiguinntøkum, inntøkum av lánsbrøvum, rentu av útlánum og innistandandi peningi.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hækkaðu við 189 tkr. úr 4.990 tkr. í 2006 til 5.179 tkr. í 2007. Hetta stavar frá natúrligum broytingum og fyri størsta partin av at kostnaðurin at umsita landsjørðina (Búnaðarstovan) hækkaði við 278 tkr. í mun til árið fyri.

Úrslitið áðrenn avskrivingar og avsetingar er 4.126 tkr. móti 3.149 tkr. í 2006 og er sostatt 977 tkr. størri enn árið frammanundan. Broytingin kemur m.a. av hækkaðu inntøkunum og broytingum í rakstrarútreiðslunum.

Útlán og eftirstøður eru vaksin við 4.854 tkr. úr 79.723 tkr. til 84.576 tkr.

Við teimum hækkandi útlánsrentunum á marknaðinum eigur grunnurin at umhugsa at hækka rentuna á útlánum.

Lánsbrøvini hava ikki givið líka gott avkast seinastu árini, sum tey fyrstu árini frá 2001, tá byrjað var at seta í lánsbrøv, men samanumtikið má sigast, at tað hevur verið ein góð loysn at keypa lánsbrøv.

Eisini eru lánsbrøvini við til at tryggja ognir grunnsins betur.

Niðanfyri er grafur, sum vísir gongdina á lánsbrøvum frá byrjan í 2001 til ultimo 2007.

Ársfrágreiðing



	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007		Miðal
Ognarrøkt	5,8%	6,9%	4,3%	3,1%	3,0%	3,0%	3,60%		4,2%
EFFAS 1-5	5,8%	7,0%	4,2%	4,5%	2,9%	0,7%	3,22%		4,0%
Innlán	3,6%	3,0%	2,2%	2,1%	2,4%	3,2%	4,27%		3,0%



	Byrjan	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007
Ognarrøkt	100,00	105,80	113,13	117,99	121,65	125,30	129,06	133,70
EFFAS 1-5	100,00	105,80	113,21	117,97	123,28	128,82	127,76	131,97
Innlán	100,00	103,60	106,66	108,95	111,29	113,96	117,60	122,62

- Innlán (grønur litur) svarar til at peningurin varð settur á innlánskontur, við hægst møguligari rentu til eina og hvørja tíð, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.

- Effas 1 – 5 (reyður litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum okkara íløgur í lánsbrøv vera samanhildin við.

- Ognarrøkt (bláur litur) eru lánsbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir rentuna p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2007 og miðal rentuna fyri sama tíðarskeið. DK Repo hevur í miðal givið 3,0%, meðan lánsbrøvini hava givið 4,2% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av hvussu nógvar krónur hvørt lánsbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2007. T.v.s. at lánsbrøvini hava givið 33,70 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo hevði givið 22,62 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Ársfrágreiðing

Lánsbrøvini hava sostatt kastað meira av sær enn innlánsrentan hevði gjørt í samlaða tíðarskeiðinum. Eisini hava íløgurnar í lánsbrøv klárað seg heldur betur enn lánsbrævamarknaðurin (effas 1 – 5) annars.

Við teimum hækkandi innlánsrentunum og lækkandi avkasti av lánsbrøvunum eigur grunnurin at umhugsa at umleggja partar av ognunum fyri at byrgja upp fyri, at avkastið minkar. Her eigur at vera ansa væl eftir trygdini – Grunninum fyri íleggjarar.

Tøkur peningur er hækkaður úr 51,9 mió.kr. í 2006 til 68,7 mió. kr. í 2007. Stóra hækkingin stavar frá sølu av jørð. Tað eru fleiri stórar útstykkingar framdar, m.a. byggingin undir Kongavarða, sum var ein upphædd upp á 9,3 mió. kr.

Grunnurin er vaksin úr 106 mió.kr. til 109 mió.kr. Hetta kemur av rakstraravlopinum.

Festikontan er vaksin úr 155 mió.kr. til 172 mió.kr. Hækkingin stavar frá nógvu jarðarsøluni, ið nevnd er omanfyri.

Grunnurin hevur gjørt uppskot til broyting av treytunum fyri fígging av festikonto, soleiðis at peningurin á festikonto í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni og ikki sum støðan er í dag, har tað bert eru nøkur fá festir í miðstaðarøkjunum, sum standa fyri langt størsta partinum av peninginum,og serliga útjaðarin ikki hevur møguleika at fáa pening av festikonto.

Eisini hevur grunnurin skotið upp, at partur av peninginum kann nýtast til kanningar og nýggjar verkætlanir, sum kunnu koma samlaða landbúnaðinum til gagns.

Peningaviðurskifti:

Fíggjarjavnin er 284.260 tkr. Av hesum er eginpeningurin 281.428 tkr., sum svarar til 99,0%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn hin 26. september 2008
Stjórn:

Sjúrður Knudsen

Stýrið

Elisabeth Eldevig
formaður

Bjørn á Heygum
næstformaður

Niels Th. Pedersen

Marion á Lakjuni

Anna Rubeksen

Góðkendur á fundi Stýrsins, hin / 2008

Fundarstjóri:

Átekning frá óheftum grannskoðara

Til stýri í Búnaðargrunninum

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2007.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við galdandi lógum. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársroknskapur kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2007 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2007 samsvarandi nýttu roknskaparreglunum.

Tórshavn hin 26. september 2008
SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

Mirjam Haraldsen
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin er, eins og undanfarna ár, gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum eru lýstar niðanfyri.

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiðinum tær viðvíkja.

Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán og eftirstøður verða upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av samlaðari niðurskriving ímóti tapi.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2007

	Nota	2007	2006
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	141.390	139.803
Rentuinntøkur v.m.	2	8.836.988	7.737.952
Sakarmálsgjøld		326.998	261.554
Inntøkur til samans		9.305.376	8.139.309
Umsiting	3	-553.313	-562.163
Húsarakstur	4	-161.936	-294.193
Starvsfólkaútreiðslur	5	-1.751.299	-1.690.853
Innbúgv v.m.	6	-12.686	-20.194
Búnaðarstovan		-2.700.000	-2.422.362
Úrslit áðrenn avsetingar		4.126.142	3.149.544
Javning í avseting til tap upp á skuldarar		-357.000	9.895.000
Ársúrslit		3.769.142	13.044.544

Fíggjarstøða 31. desember 2007

	Nota	2007	2006
		kr.	kr.
OGN			
Støðisogn		0	0
Materiell støðisogn		0	0
Støðisogn til samans			
Ogn í umferð			
Áogn	7	84.576.337	79.722.588
Útlán og eftirstøður	8	389.656	297.977
Onnur áogn		84.965.993	80.020.565
		130.554.576	131.546.163
Lánsbrøv	9	68.739.490	51.860.016
Tøkur peningur		284.260.059	263.426.744
Ogn í umferð til samans		284.260.059	263.426.744
OGN TIL SAMANS			

Fíggjarstøða 31. desember 2007

	Nota	2007	2006
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginpeningur			
Grunnurin	10	109.184.898	105.415.570
Festikontur	11	172.226.674	155.340.854
Kolagrevstrargrunnurin		16.804	16.803
Eginpeningur til samans		281.428.376	260.773.227
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Onnur skuld	12	2.831.683	2.653.517
Skuld til samans		2.831.683	2.653.517
SKYLDUR TIL SAMANS		284.260.059	263.426.744
Eventualskyldur og veðsetingar	13		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2007	2006
	kr.	kr.
Festileiga	26.959	27.009
Traðarleiga	90.831	81.394
Festigjøld við skifti	23.600	31.400
	141.390	139.803

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	2.787.725	2.754.984
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	3.372.770	3.109.030
Rentur av innistandandi peningi o.a.	1.678.127	976.976
Rentur av eftirstøðum	998.366	896.962
	8.836.988	7.737.952

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	0	-100
Løgfrøðilig hjálp	49.500	40.700
Serkøn hjálp	23.540	68.005
Postgjald	13.215	14.095
Grannskoðan	75.000	75.000
Roknskaparhjálp v.m.	26.265	37.000
Trygging	2.049	13.876
Tinglesing	12.829	-3.949
Ymiskt	40.843	24.841
Námsferðir	0	18.051
Edv-útreiðslur	7.469	8.254
Telefon	27.701	32.341
Internet	28.317	31.956
Haldaragjald, bløð o.a.	18.111	15.693
Framtíðarlandbúnaður	0	84.100
Serkøn hjálp - Landbofyn	156.043	0
Aðrar skrivstovuútreiðslur	72.431	102.300
	553.313	562.163

Notur

4 Húsarakstur

	2007 kr.	2006 kr.
Viðlíkahald	16	55.321
Reingerð o.a.	47.880	47.830
Ljós og hiti	26.782	23.677
Trygging av ognum	14.711	0
Urtagarðurin	54.597	143.865
Ávaringarskipan	12.000	12.000
Húsavarðatænastan	5.950	11.500
	161.936	294.193

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	1.205.979	1.156.003
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	10.329	27.398
Arbeiðsloysistrygging	15.104	14.358
Barsilsskipanin	10.042	8.866
Eftirlønargjald	162.174	150.289
	1.403.628	1.356.914
Lønir og lønargjøld til samans	330.109	317.412
Dagpeningur, Stýrið	17.562	16.527
Ferðapeningur, Stýrið	1.751.299	1.690.853

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	12.686	20.194
	12.686	20.194

7 Útlán og eftirstøður

Ymiskar útlánskontur	104.984.621	102.887.914
Avdráttir og rentur, fallin til gjaldingar	32.134.773	29.069.236
Fallin festi- og traðarleiga	43.943	-4.562
Avsett til tap	-52.587.000	-52.230.000
	84.576.337	79.722.588

Notur

8 Onnur áogn

	2007	2006
	kr.	kr.
Mvg-áogn	261.242	163.114
Onnur áogn	128.414	134.863
	389.656	297.977

9 Tøkur peningur

Kassapeningur	2.303	1.944
P/F Føroya Banki	30.443.666	31.739.291
P/F Eik Banki	29.034.646	10.778.689
Suðuroyar Sparikassi	184.785	145.235
Norðoya Sparikassi	3.956.824	4.118.555
Landsbankin	5.036.463	4.940.471
Postgiro	80.803	135.831
	68.739.490	51.860.016

10 Grunnurin

Salda 1. januar	105.415.570	92.371.026
Rakstraravlop	3.769.142	13.044.544
	109.184.712	105.415.570

Notur

11 Festikontur

	2007	2006
	kr.	kr.
Salda 1. januar	154.476.117	144.372.618
Søla av jørð	15.085.332	8.560.225
Inngoldið fyri vetrarbit	1.580.811	989.563
Inngoldið fyri vetrarfriðing	1.460.248	0
Inntøka av grótbrotum	681.589	642.807
Frábýtisútreiðslur	0	-950
Leiga	379.248	353.285
Alistøðir	386.813	161.530
	174.050.158	155.079.078
Útgoldið, netto	-2.688.221	-602.961
	171.361.937	154.476.117
Festikontur 31. desember	864.737	864.737
Ikki sundurgreinað inngjøld	172.226.674	155.340.854

12 Onnur skuld

Skyldugar útreiðslur – Búnaðarstovan	2.700.000	2.422.656
Skyldugar útreiðslur – Føroya Gjaldstova	131.683	131.683
Avsett til eftirlønargrunn	0	12.700
Avsett til grannskoðan	0	52.203
Avsett til dag- og ferðapening	0	34.275
	2.831.683	2.653.517

13 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.